# Lyngby bjargaði sær javnleik

Tað stóð einki til hjá Lyngby í superligadystinum ímóti Randers um vikuskiftið. Randers legði seg á odda bæði 1-0 og 2-0, og tað var eisini støðan, tá ið tað restaðu 10 minuttir av dystinum. Men so gjørdi Lyngby ein ordans endaspurt og kláraði at javna til 2-2, sum eisini gjørdist úrslitið av dystinum. Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst byrjaði á vøllinum, men hann varð skiftur út miðskeiðis í seinna hálvleiki.



# Vit eru komnir á botn

Leygardagin tapti Newcastle 3-0 á heimavølli fyri Liverpool. Seinast Newcastle spældi heima, taptu teir 4-1. Tí er einki at siga til, at lagið í norðurenska felagnum er vánaligt í løtuni. - Vit eru komnir á botn, og nú skulu vit stríða okkum upp úr hesum holinum. Eg havi fyrr klárað at vent eini skeivari gongd, og tað er bara ein gongd leið. Vit mugu standa saman og stríðast, sigur venjarin Sam Allardyce við Sky Sports.

# Fáa Ísland og Luksemburg

**Tað er nú greitt, at føroyska fótbóltslandsliðið fær tveir venjingardystir komandi vár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umfram at fylgja við í sjálvum lutakastinum, sum var í Durban í Suðurafrika, nýttu FSF-umboðini eisini møguleikan at fáa sær nøkur mótstøðulið, nú fótbóltsárið ikki hevur undankappingaruppgávur fyrr enn á heysti 2008.

Og hetta hevur eisini borið ávøkst. FSF boðar nú frá, at tað hevur eydnast at fáa tveir venjingardystir til føroyska landsliðið. Tann fyrri av hesum verður á útivølli móti Íslandi í mars mánaði, og eftir øllum at døma verður hesin dysturin ístaðin fyri árligu venjingarleguna á la Manga í Spania. Ein venjingarlega, har føroyska landsliðið ikki hevur spælt nakran veruligan landsdyst seinnu árini.

Seinni dysturin verður á heimavølli móti Luksemburg, og verður hesin væntandi um mánaðarskiftið apríl/mai.

# Fá róðu kapp

**Hóast talan var um væl skipaða kapping, so var óvanliga lítil áhugi fyri úttøkukappingini í innieróðri um vikuskiftið**

INNIRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Samanlagt fyri allar vekt- og aldursbólkar vóru ikki fleiri enn 27 rógvarar við í einstaklingakappingunum, og hetta eru væl færri, enn tað vanliga eru til slíkar kappingar.

Og tá hugsað verður um, at talan samstundis var um úttøkukapping, har fremstu rógvararnir sleppa til NM-kappingina, er undirtøkan merkisvert lág.

Á heimasíðuni hjá Havnar Róðrarfelag, drekin.fo, verður beinleiðis sagt, at inniróðurin hevur eina dapra framtíð, samstundis sum nortið verður við, at fleiri rógvarar heldur vilja vinna seg til DM-kappingina.

Frá øllum síðum fáa miðvingar, sum skipaðu fyri kappingini, tó rósandi orð. Og funnið varð eisini fram til fýra róðrarfólk, sum í januar fara at kappast um NM. Tey fýra eru Oyvind Lützen, Gerda Olesen, Durita Wang Jacobsen og Anfinn Sivertsen.

| Dreingir 12 ár - 500 metrar | |
|---|---|
| **Navn** | **Tíð** |
| Kristian Fróði Jacobsen | 2.20,00 |
| Tóri Nielsen | 2.20,09 |
| Tummas Hansen | 2.42,01 |
| **Dreingir 13-14, 1000 metrar** | |
| Oyvind Lützen | 1.43,00 |
| **Gentur 13-14, 1000 metrar** | |
| Gerda Olesen | 2.01,03 |
| Durita Wang Jacobsen | 2.03,06 |
| Sylvia Johansen | 2.10,04 |
| **Gentur 15-18, 2000 metrar** | |
| Annetta Cecilia Eidesgaard | 2.02,08 |
| **Lættvekt menn, 2000 metrar** | |
| Andrias Hansen | 1.40,02 |
| Bárður Jacobsen | 1.45,09 |
| Eyðbjørn Mouritesen | 1.48,01 |
| **Tungvekt menn 2000 metrar** | |
| Anfinn Sivertsen | 1.35,02 |
| Magnus Madsen | 1.40,08 |
| Martin Dahl | 1.41,05 |
| **Lættvekt kvinnur, 2000 metrar** | |
| Sarita Kristina Hansen | 1.57,04 |
| Birgit Beder | 2.02,01 |
| **Tungvekt kvinnur, 2000 metrar** | |
| Anly Joensen | 2.00,08 |
| **Menn 35 ár og eldri, 2000 metrar** | |
| Andras Davidsen | 1.56,02 |
| Jógvan Hans Hansen | 1.59,07 |
| **Liðkapping, 3000 metrar** | |
| Argir 1 | 1.40,02 |
| Argir 2 | 1.40,05 |
| Miðvingur | 1.40,05 |




Dráttur-Mjølnir 3-1 (26-24, 15-25, 25-23, 25-16):

# Mjølnir vildu kempa um stigini

**Sum sæst á settúrslitunum, var tað ein tættur dystur í Meistaradeildini hjá kvinnum í høllini á Giljanesi, men tá alt kom til stykkis, fóru vertirnar við sigrinum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Klaksvíkskvinnur úr Mjølni vóru á vitjan á Giljanesi sunnudagin, har Dráttur vóru vertir. Og fyrsta settið gekk rímuliga tætt fyri seg. Og endaði tað eisini 26-24 til heimaliðið. Í øðrum setti legði Mjølnir sjógv ímillum seg og Drátt og vunnu klaksvíkskvinnur trygt 25-15.

Vágadamurnar vildu ikki hava á sær, at Mjølnir skuldi koma vestur í Vágar at stjala seg til sigurs, so tær tóku seg saman og vunnu triðja sett tepurt 25-23. fjórða settið var størri nmunur á, og vunnu vágadamur eisini tað, og við tí eisini dystin.

### Vend í hjá Mjølni

Kvinnurnar hjá M;jølni hava gamaní ikki fingið nakað stig í kappingini enn, men tær hava ikki langt eftir á mál, áðrenn fyrstu stigini fara at koma í skjáttuna. Sunnudagin vóru klaksvílksdamur tætt við, men Dráttur hevði munin og vann tepurt 3-1.

ÍF-Fleyr 3-0 (25-15, 25-15, 26-24):

# ÍF er í steypafinaluni

**Við sigrinum á Fleyr, kundu kvinnurnar hjá ÍF fegnast um at hava vunnið, og eisini tann veruleika, at tær eru við í ársins steypafinalu, ið verður spæld í februar mánaða í Havn**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Fleyr hava havt tað trupult í ár, og tær eru enn ikki komnará stigatalvuna, men sunnudagin knudu tær við eitt sindur av hepni og neyvleika havt vunnið sær fyrsta settið í kappingarárinum. Hetta skuldi tó ikki koma fyri, tí til tess vóru kvinnurnar úr Fuglafirði ov sterkar.

Fleyr hevur í ár valt at stilla við einum blaðungum liði í Meistaradeildini, og tær somu spæla eisini í kappingini hjá kvinnuunglingum. Hetta er ein tíð, har genturnar mennast og nema sær førleika, so tað er spennandi, hvat fer at spyrjast burturúrhesum liðnum í framtíðini.

### ÍF fremst eftir triðing

Á stigatalvuni eru tað ÍF, ið eru fremstar, nú triðingurin av kappingarárinum er liðin. Tær hava 12 stig, og tætt í hølinum á teimum koma so SÍ. Eftir kappingarskipanini strendur at lesa, at liðið, ið liggur ovast á rókini, eftir at triðingurin av kappingini er spældur, vinnur sær luttøku í ársins steypafinalu, ið verður spæld í Havn í februar mánað. Í hesari finalu møta tær SÍ, ið vunnu sær hendan rætt í Fleyr kappingini, fyrr í ár.